# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Próvtøka hjá hárfríðkarum



*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 22. apríl vóru sveinaroyndirnar lidnar á Stíl- & Sniðdeildini á Tekniska Skúla í Havn hjá seks næmingum. Royndirnar vórðu gjørdar týsdagin og mikudagin, og prógvini verða handað fríggjadagin.

Á myndini eru tær seks, sum gjørdu sveinaroyndirnar, og framman fyri tær eru modellirnar hjá teimum.

**F.v.:** Betty Ellen Hansen við Aleth sum modell, Davia Gertrud Petersen við Jónu sum modell, Hanna Guttesen við Evie sum modell, Marita Reinert Mohr við Maritu sum modell, Rebekka Lisberg við Vígdis sum modell, og Sunneva Myllhamar við Sólfríð sum modell.

## Elsa Olsen saman við sínum

Mánadagin høvdu vit eina grein í blaðnum um Elsu Olsen av Argjum, sum fylti 100 ár týsdagin. Føðingardagurin var hildin í Róðrarneystinum á Argjum, har nógv fólk vóru inni og heilsaðu Elsu. Her er hon avmyndað við nøkrum av sínum.

**ó.**






Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jónrith Fredriksen, Miðvágur**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 65 ára gomul.

**Amy Olsen, Rituvík**, andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi týsdagin, 83 ára gomul. Farið verður av Røktarheiminum fríggjakvøldið kl. 18 í Rituvíkar kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Amy, kunnu lata Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi eina peningagávu.

**Marjun Rasmussen**, fødd Petersen, ættað úr Tórshavn andaðist mánadagin 20. apríl, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Brøndby Strand kirkju fríggjadagin kl. 13.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Per Húsgarð**
Syðrugøtu

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Martin Restorff Jacobsen, prest, kórið og kirkjutænara.
Takk fyri blómur og kransar.
Takk til heimasjúkrsystrar og starvsfólk á G4 á Landssjúkrahúsinum.
Takk til tykkum, sum tóku sær av ervinum og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Elinborg, Líggjas, Marjun og Pætur**

**60 ára føðingardagur**
Í dag 23. apríl verður Alexandur Kristiansen, skald, Fuglafjørður 60 ár. Hann er burturstaddur.

**Konfirmantar í Nólsoyar kirkju 26. apríl**
Laila Hansen
Maria Joensen
Jakobina Johannesen
Anna Malan Jógvansdóttir

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin 10. mai 2009 konfirmerast í Filskov kirkju Bárður Hentze, sonur Inga Hentze Hoyvík. Adressan er: Postgade 12, Filskov, 7200 Grindsted, Danmark.

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin tann 10. mai verður í Fasterholt kirkju (Danmark) Victor John Andreasen, sonur Rósu Andreasen og Victor Olsen, konfirmeraður. Adressan er: Ejstrupvej 16, DK-7330 Brande +45 97188823

**Dagurin**
**23. apríl. Georgius**, deyður umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hesin kristni riddarin feldi ein dreka og bjargaði kongsdóttrini har í staðnum. Hann varð seinni tikin av døgum fyri trúar sakir. Dagurin er valdur til almennan skótadag um allan heim. Grikska navnið merkir hann sum dyrkar jørðina.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*